# 8. SÁLMUR DÁVIDS

*Harri, vár drottin, hvør vegligt er navn títt um allan heimin,*
*tú, hvørs dýrd røkkur til himna!*
*Av smábarna og bróstabarn munni*
*tú verju hevur tær gjørt, fyri tína fígginda skuld,*
*fyri øvundarmonnum og hevndsjúkum at steðga.*
*Líti eg at tínum himni,*
*fingraverki tínum,*
*mána og stjørnum, sum tú hevur fest-*
*hvat er tá maður, at tú minnist á hann,*
*og mannabarn, at tær kemur tað i hug!*

*Tú gjørdi hann nærum til Guð,*
*hevur krýnt hann við dýrd og við æru,*
*hevur sett hann at ráða yvir handaverki tínum*
*og alt undir føtur hans lagt,*
*seyð og oksar, alt tilsaman, markarinnar villdjór tíllíka, himmalsins*
*fuglar og havsins fiskar alt, ið á sævargøtum ferðast.*
*Harri, vár drottin, hvør vegligt er navn títt*
*um allan heimin!*